5. flokkur vælkomin í ungdómshúsið í Hoyvík – KLUBB 188

So fer KLUBB 188 aftur at bjóða næmingunum úr 5. flokkunum í Tórshavnar kommunu at koma í ungdómshúsið í Hoyvík – KLUBB 188.

Endamálið við innbjóðingini er, at ungdómurin sleppur at uppliva umstøðurnar og tað virksemi sum verður bjóðað í KLUBB 188, áðrenn tey fáa møguleika at koma í ungdómshúsið eftir summarfrítíðina.

KLUBB 188 heldur til í somu hølum sum frítíðarskúlin í Hoyvík, og verða hølini broytt til meira ungdómslig um kvøldarnar.

Á skránni verður alt tað vanliga virksemi sum m.a. er: KLUBBquiz, ymisk spøl, teldur, prát, hugni, tónleikur, sjónvarp og kiosk.

Opið verður fyri 5. flokki hesi kvøld áðrenn summarfrítíðina:

23. mai og 9. juni frá kl. 18.00-20.00.

Hesi kvøld verður opið fyri fyri 6. fl. – 18 ár frá kl. 20.00.

Tað er ókeypis at koma í KLUBB 188.

Um spurningar ella annað, so eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Bjarna Beder, leiðara á tlf. 214789 ella bjarnibe@torshavn.fo